## Stuðul til heilivág í samband við CTD

Tann 1. januar 2010 fingu føroyingar eina nýggja almenna heilsutrygdarskipan, nevnd Heilsutrygd (Løgtingslóg nr. 178 frá 22.12.2009), og eftir 1. apríl 2010 koma allar veitingar til heilivág undir Heilsustrygd. Carnetin fær tilskot frá Heilsutrygd, so bæði tablettirnar og miksturuin koma undir nýggju tilskotsskipanina. Tilskotsskipanin virkar soleiðis:

50 % av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 500 kr. og upp til 1.000 kr.,
75 % av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 1.000 kr. og upp til 2.000 kr.,
85 % av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 2.000 kr. og upp til 6.000 kr.
100 % av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 6.000 kr.

Tó 100 % av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 3.300 kr. fyri børn undir 18 ár og persónar yvir 67 ár.

**Hetta vil siga, at hægsta egingjaldið fyri børn undir 18 ár og persónar yvir 67 ár verður 1195 kr., meðan hægsta egingjaldið fyri persónar yvir 18 ár verður 1600 kr.**

### *Viðvíkjandi børnum undir 18 ár*

Áður (áðrenn 1. apríl 2010) fingu persónar, sum í heiminum forsyrgja einum barni við likamligari ella sálarligari sjúku/breki, sum hevur við sær serligar útreiðslur, endurrindaðar slíkar neyðugar meirútreiðslur sambært § 17, stk. 1 í forsorgarlógini. Foreldur at børnum við CTD komu undir hesa grein. Útreiðslurnar hava verið rindaðar fult, tvs. at foreldur at barninum einki egingjald hava rindað.
Við lógarbroytingini verður heilivágur, herundir carnitin, ikki longur fevndur av § 17, stk. 1, og hesi vera tí partur av vanligu heilivágsskipanini hjá Heilsutrygd. Hetta merkir samstundis, at tey koma at hava eitt egingjald til heilivágin. Hetta egingjaldið kann tó í mesta lagi gerast **1195 kr**. árliga, sum áður nevnt.

### *Viðvíkjandi persónum yvir 18 ár*

Persónar, sum eru fevndir av § 18, stk. 7 í forsorgarlógini (broytt til § 18 c frá 1. apríl 2010 við Ll. nr. 179 frá 22. des. 2009), fingu (áðrenn 1. apríl) stuðul til teirra part av heilivágsútreiðslunum sambært forsorgarlógini. Talan er í flestu førum um fólk, sum eru varandi sjúk, herundir persónar við CTD. Stuðulin er skipaður soleiðis, at hesir persónar fáa goldið teirra part av heilivágsútreiðslunum, sum fara upp um eitt egingjald áljóðandi 600 kr. um ársfjórðingin.
Nýggja heilivágsstuðulsskipanin, sum kemur í gildi 1. apríl 2010, er munandi øðrvísi. Tá verður stuðulin veittur í mun til nýtsluna, soleiðis at ongin stuðul verður veittur til heilivágsútreiðslur undir 500 kr. árliga, og at stuðulin veksur við nýtsluni. Tó er, sum áður nevnt, loft á egingjaldinum soleiðis, at eingin kemur at rinda meira enn **1.600** kr. árliga fyri heilivágin.